# “Vembur má hann duga at vaska” – krøv til ummælaran og ummælið sum tekstslag í samskiftinum millum Tórodd Poulsen og ummælararnar

Fróðskaparrit 67 (2021): 96-109
©The Author(s) 2021 Open Access under Creative Commons by Attribution License. Use, distribution and reproduction are unrestricted. Authors and original publication must be credited.
DOI: 10.18602/fsj.v0i0.136
www.frodskapur.fo/

## “He must know how to clean rumen”[1] – What it takes to be a critic and literary criticism as a genre in the communication between Tóroddur Poulsen and his critics

**Paula Gaard** *
*Føroyamálsdeildin, Fróðskaparsetur Føroya*

**Abstract**

The article discusses literary criticism as communication between the critic and the poet. Considering the claim that the literary review is a threatened genre, the article delves into a selection of the ongoing dialog between Faroese poet Tóroddur Poulsen and his critics. It is argued that the poetic texts of Poulsen can serve as examples of how literary reviews, understood in the widest sense, are not restricted to the media they are often perceived as depended upon and that they can transgress the criteria defining their genre.

**Úrtak**

Greinin varpar ljós á bókmentaummæli sum samskifti millum ummælara og skald. Við tí útbreidda uppáhaldinum í huga at ummæli eru hótt tekstslag, verður royndarborað í eitt úrval av samskiftinum millum Tórodd Poulsen skald og ummælarar hansara og víst á, at skaldskapur Tórods er dømi um, at ummæli í breiðastu merking avmarka seg ikki til teir miðlar, sum verða hildnir at treyta tey, og til tey tekstslagskrøv, sum skilmarka tey.

**Keywords:** Literature, literary criticism, reviews, authority, power, media, genre.
Bókmentir, bókmentakritikkur, ummæli, myndugleiki, vald, miðlar, tekstslag.

*E-mail: paulag@setur.fo

[1]The quote by Tóroddur Poulsen refers to his description of the critic: He does not need to be a butcher, but he must know how to clean a rumen of a slaughtered sheep (Poulsen, 1994, s. 113).

## Inngangur

Tað tykist, sum semja er á mentanarpallinum um, at í dagsins samfelag eru umstøðurnar samanumtikið ikki góðar fyri ummæli, sum vit kenna tey, bæði tí at ummælarin er hóttur í broyttum valdsstrukturum í samfelagnum og vegna stórar broytingar í miðlalandslagnum seinnu árini. Út frá hesum kannar greinin støðuna viðvíkjandi bókmentaummælum í føroyskum høpi. Leitað verður út um tey strongu tekstslagskrøvini og víst á, at ummæli í breiðari merking hava møguleika og evni til at finna aðrar pallar. Víst verður samstundis á, at tá ummæli trína fram á hesum óvæntaðu pallum, kann teirra valdmikla støða eykast.

Viðgerðin í greinini er avmarkað til eitt kut úr føroyskum bókmenta- og ummælaraheimi: øðrumegin eitt úrval av tekstum og útsagnum hjá Tóroddi Poulsen skaldi og hinumegin nøkur dømi um ummæli um tekstir Tórods. Dømini í úrvalinum røkka frá 1979 til 2017.

## Ummælið sum tekstslag

Ummæli eru tekstslag, sum á serligan hátt er treytað av øðrum tekstsløgum og av samspælinum millum tekstir og miðlar. Ummælið er liður í samansettum kervi, ið er myndað av ymiskum leikarum á tí bókmentaliga økinum, sum viðvirka til, at ein bók verður framleidd, kemur út á marknaðin og verður móttikin. Franski bókmentagranskarin Robert Escarpit, sum setti ta modernaðu bókmentasosiologiina á stovn, lýsir hetta sum eina bókmentaliga ringrás (Escarpit, 1958/1968).

Ummælini hava sítt sjálvsagda pláss í bókmentaligu ringrásini. Tey eru týðandi liður í móttøkuni av einum verki, sum verður givið út á marknaðin, og virka sum millumliður millum rithøvund og lesara í móttøkutilgongdini. Tey eru við til at gera lesaran tilvitaðan um, at ein bók er útkomin, og tey eru við til at avgera, í hvønn mun verkið yvirhøvur verður móttikið.

Ummælini eru valdmikið tekstslag, sum kann hava ávirkan í øllum liðum í teirri bókmentaligu ringrásini; á sølutøl, hvør fær virðislønir og viðurkenning av øðrum slag, eins og tey kunnu hava ávirkan á kanoniseringartilgongdina í bókmentakervinum - á hvussu bókmentasøgur verða skrivaðar.

Ummælið vaks fram sum tekstslag í dagbløðum og tíðarritum í 18. øld, tá eitt borgaraligt almenni varð til, og ein marknaður fyri tíðindamiðlan í tíðarritum og dagbløðum (Bredsdorff et al., 1983, s. 7), har kjak og tann almenna samrøðan um list og bókmentir, sum bygdi á fólkaræði og alment vit og skil, setti dagsskránna (Eagleton, 1984/2005, s. 9).

Granskarar hava víst á, at ummælið sum tekstslag inniheldur fýra høvuðskomponentar, nevniliga kunning um, at eitt verk er útkomið, samandrátt av verkinum, viðgerð av tí og meting (Andreasen & Winge 1972, s. 48-53, Bredsdorff et al., 1983, s. 8). Fleiri granskarar hava lagt serligan dent á kravið um metingina og fara so langt sum at siga, at smaksdómurin er eitt ófrávíkiligt tekstslagskrav (Kyndrup, 2009, Christiansen, 2010, s. 59, Pedersen, 2019).

## Ummæli sum skaldskapur og skaldskapur sum ummæli

Eitt av teimum fyrstu ummælunum í føroyskari ummælarasøgu kann betur lýsast sum mótyrking til áður prentaða yrking enn sum ummæli í strangari merking. Mótyrkingin kann sigast at vera ein undanformur til ummælið, skrivað sum viðmerking til skaldskapin fyri at meta um hann, altso at fremja ta funktiónina hjá ummælinum, sum sambært flestum ástøðingum er tann fremsta: at meta um skaldskap.

Tað kendasta føroyska dømið um mótyrking, sum hevur ummælisfunktión, er aftursvarið hjá Andras Sámalson (seinni: Samuelsen) til vísuna "Vaagen" eftir J. P. Gregoriussen, sum varð prentað í *Føringatíðindi* 15. februar 1894 (Sámalson, 1994). Hann vildi, sum Malan Marnersdóttir og Turið Sigurðardóttir hava víst á, vera við, at skipið var í vanda, tí Várharra sendi stormin og var tí eisini tann, sum bjargaði teimum, tí "hann vildi vísa sína almakt" (Marnersdóttir & Sigurðardóttir, 2011, s. 493). Turið Sigurðardóttir nevnir eisini hetta dømið í grein um kappyrking og mótyrking og sigur, at til og við romantikkinum var tað ikki óvanligt, at skald svaraðu aftur yrking við yrking, og at lyriskur skaldskapur soleiðis tænti sum kjakpallur fyri ymisligastu evni (Sigurðardóttir, 1994). Her er sostatt talan um, at føroyskt ummælaravirksemi í hesum fyrsta tíðarskeiði var partur av tí almenna kjakinum í samfelagnum, eins og hann var í upplýsingarøldini, tá tey fyrstu ummælini vórðu skrivað (Eagleton, 1984/2005, s. 10), og kritikkur var mentanarligur og ikki beinleiðis ein bókmentalig afturmelding til bókmentir (Eagleton, 1984/2005, s. 18). Í sniði var mótyrkingin yrking, men innihaldsliga var hon í ætt við ummælini og onnur tekstsløg, sum meira leggja upp til kjak og mótspæl.

Hesin háttur at svara einum teksti aftur og meta um hann í yrkingasniði er ikki óvanligur í dag, tó at hann nú gjarna verður nýttur við einum tilviti um, at yrkingin júst skal vera formurin og ikki ummælistekstslagið. Dømi um hetta er ummælið, sum Hanus Andreassen (nú Kamban) skrivaði, tá týðingin hjá Axel Torgarð av *Norðlandslúðrinum* eftir Petter Dass, sálmaskaldi, var útkomin, og formaði tað sum yrking í sama ørindislagi sum yrkingin hjá Petter Dass (Andreassen, 1999).

Dømi um tað mótsetta, nevniliga at ummæli verða skrivað sum yrkingar millum aðrar í útgivnum yrkingasøvnum, er yrkingin eftir Alexandur Kristiansen í yrkingasavninum *Báðumegin blátt*, sum ber heitið "UMMÆLI (yrkingar eftir Chr. Matras)", har hann hálovar skaldskapinum hjá Chr. Matras í fýra rímaðum ørindum (Kristiansen, 2005).

Hjá Tóroddi Poulsen er hetta slagið av ummælaravirksemi ein týðandi partur av hansara skaldskapi sum heild og liður í einari dagsskrá at toyggja og tamba tekstslagshugtakið. Í einum kapitli, sum verður nevndur "Fiktionalisert litteraturkritikk" í bókini *Forfatteren som kritiker*, kemur norski granskarin í ummælum Sissel Furuseth inn á hetta, at ummæli kunnu trína fram í ymiskum formum. Tey eru ikki avmarkað til bløð og tíðarrit. Furuseth vísir til norsk dømi um høvundar, sum metaummæla í sínum skaldskapi, t.d. Erlend Loe og Nicolai Houm. Hon vísir á, at "ummælarin" her hevur serlig kor, og at tað ger hann onkursvegna betur vardan, tí hann ger ummælið til ein part av fiktiónini (Furuseth, 2015, s. 48-49). Hon vísir eisini á, hvussu Nicolai Houm í skaldsøgu

síni letur ummælaran verða yvirkoyrdan av einum sporvogni í Berlin á veg til eitt bókmentatiltak, tí hann rennur aftan á franska rithøvundinum Michel Houellebecq og gloymir at hyggja uttan um seg (Furuseth, 2015, s. 48). Hetta kann samanberast við tað, sum Jóanes Nielsen ger við ummælaran og rithøvundin Carl Jóhan Jensen í skaldsøguni *Bommhjarta*, tá Carl Jóhan smellur í gólvið og doyr, meðan hann situr sum áhoyrari til kórframførslu av sínum egnu yrkingum (Nielsen, 2016, s 282-285). Eisini vísir Furuseth á, at Knut Hamsun og Hanne Ørstavik við 110 ára millumbili bæði hava ummæli sum part av skaldskapinum í sínum útgávum. Bøkurnar hjá Knausgård eru somuleiðis dømi um skaldskap við longum brotum um aðrar bókmentir, t.d. um skaldskap hjá júst Hamsun (Furuseth, 2015, s. 50).

## Ummælarin og umdømi hansara millum rithøvundar

Granskarar hava víst á, at ummælarar eru illa dámdir av rithøvundum, og at teir hava verið sæddir sum snultarar og gjørdir til láturs. Ummælaravirksemi hevur verið mett at vera eitt ókreativt starv; eitt avleitt virksemi, sum rætt og slætt hevur lítlan týdning (Hagen, 2004, s. 13, McDonald, 2007, s. 8). Í skaldskapinum eru óteljandi dømi um, at rithøvundar beinleiðis niðra virksemið hjá ummælarum. Amerikanski sangarin og yrkjarin, nobelvinnarin Bob Dylan, setir í yrkingini "Ballad of a Thin Man" niður á ummælaran, tá hann setir hann fram sum ein, ið hevur allar førleikar til at ummæla, men skilir ikki, hvat tað er, sum er upp á spæl, tá tað kemur til list (Dylan, 1965/2014). Hetta er heldur ikki óvanligt í føroyskum skaldskapi. Skaldið Poul F. Joensen vísir sín hugburð til ummælarar, tá hann í yrkingini "Skaldametarar" sigur, at ummælarin fær nakað annað burtur úr verkinum, enn høvundurin ætlaði: "Teir jótra sum neyt eitt skaldaverk,/ til betur enn skaldið teir duga,/ ja, finna hugsjónir, symbolir og gátur,/ sum aldri var honum í huga" (Joensen, 1967/1988, s. 48), og Steinbjørn B. Jacobsen samanber í yrkingini "Ummælarin" tað at yrkja við at baka drýl, men sigur, at ummælarin etur drýlarnar, meðan hann alsamt mølmar um breyð. Hann ummælir við øðrum orðum ikki verkið, men tað verk, sum hann kundi hugsað sær at lisið: "Hon hevur bakað drýlar/ Hvørki fransbreyð ella rugbreyð/ Hann át drýlarnar so dánt/ Alsamt mølmandi um breyð" (Jacobsen, 2002, s. 39). Eisini her endurspeglast skaldsins hugburður til ummælarar. Fjøllistamaðurin Tóroddur Poulsen, ið henda greinin tekur støði í, kallar ummælarinnuna, sum hann nevnir hana, blinda (Poulsen, 1992a). Hetta verður komið aftur til.

## Tóroddur Poulsen og krøv til ummælaran

Í áðurnevnda brotinum í skaldsøguni *Bommhjarta* eftir Jóanes Nielsen, har Carl Jóhan Jensen letur lív, verður ummælaravirksemi hansara í skemtiligum tóna umrøtt sum slakt, ja "lívsneyðugt slakt á tí heilaga bókmentaliga offurstabbanum" (Nielsen, 2016, s. 285). Eisini Tóroddur Poulsen nýtir myndamál frá slakti í sínari lýsing av ummælaranum í bókini *Reglur*: "Ein ummælari nýtist ikki at vera svævari, men vembur má hann duga at

vaska" (Poulsen, 1994, s. 113). Myndamálið skapar hugasambond til hóttandi myndir av ummælaranum sum svævara og lýsir, at talan er um vald at gera av, hvat ið livir ella doyr, hóast sagt verður, at ummælarin ikki nýtist at vera svævari. Hetta vald, sum ummælarin, tá til stykkis kemur, hevur, ger skaldverkið til offur, sum ikki fær vart seg, men verður fyri alskyns viðferð.

Uppgávan hjá ummælararnum er sambært Tóroddi Poulsen ikki fyrst og fremst at vera "svævari". Leikluturin sum durðavørður í teirri bókmentaligu ringrásini er við øðrum orðum ikki tað, sum fyrst og fremst nýtist at eyðkenna ummælaran, men eitt minstamark av krøvum má verða sett til ummælaran: hann má duga at vaska vembur, ella hann má duga at hagreiða tekst við skili.

Tóroddur Poulsen gevur ummælaranum harða viðferð, tí hann misskilir skaldskap og dugir ikki at ummæla (Poulsen 1994, s. 42-45). Hann er ítøkiligur og vísir til ávíst ummæli av sínum skaldskapi, ið ikki livir upp til tey krøv, sum hann setir til ummæli – ein kritikkur, sum er útgreinaður í mótummælinum "Hin blinda á listaframsýning". Ummælið, sum hann kritiserar, er eitt útvarpsummæli av yrkingasavni hansara *navn nam við navn* (1991). Sambært Tódoddi Poulsen livir ummælarinnan her ikki upp til sína uppgávu, m.a. tí hon ikki dugir at lesa millum reglurnar og greiða frá sínari uppliving av yrkingunum. Vegna sín vantandi lesiførleika verður hon kallað hin blinda; altso verður hon lýst sum ein, ið ikki sær - les: skilir - skaldskap, men bara reksar tað upp, sum hon sær standa á bókarsíðunum (Poulsen, 1992a).

Hetta, áhaldandi at harta og tykta ummælaran og seta honum krøv, sæst ikki bara í *Reglum* og hesum eina mótummælinum, men er ein tráður, sum gongur aftur í skaldskapinum hjá Tóroddi Poulsen.

## Tekstslag í kreppu?

Hóast ummælararnir oftast tykjast vera ein pest meira enn nakað annað í skaldskapinum hjá Tóroddi Poulsen, fær lesarin kortini eina hóming av, at orsøkin er ikki vanvirðing fyri starvinum at ummæla, men heldur tvørturímóti. Og tí fær ummælarin toyggið, tá hann ikki livir upp til krøvini til hetta týdningarmikla starvið. Í *Varðanum* frá november 2017 sigur Tóroddur Poulsen í samrøðu við ritstjóran Dorit Hansen, at hann saknar tey væl gjøgnumarbeiddu ummælini, tí tey hava nakað at siga lesaranum (Hansen, 2017, s. 55). At seta krøv til ummælaran sprettur tí úr tilviti um, at ummælið hevur týdning; at ummælið er tekstslag, sum millum annað sambært honum hevur ta funktión í tí bókmentaliga stovninum, at tað mennir góðar lesarar av skaldverkinum og kann provokera rithøvundar og geva teimum okkurt at hugsa um. Tóroddur Poulsen sigur somuleiðis í samrøðuni, at hann heldur ikki, at útvarpsummælið kann koma í staðin fyri tað væl gjøgnumarbeidda skrivaða ummælið. Hann fer so langt sum at siga, at vit eru í vanda fyri at missa ummælið sum tekstslag, um vit ikki halda tað viðlíka (Hansen, 2017, s. 55).

Tóroddur Poulsen er ikki tann einasti, sum óttast um framtíðina hjá ummælinum sum tekstslag. Tað hevur í mong ár verið ein partur av retorikkinum rundan um ummælini, at

tey standa á gravarbakka, ikki bara her heima hjá okkum í Føroyum. Kortini eru tað tey, sum vilja vera við, at søgan um deyðan hjá ummælinum sum tekstslagi er ein endurtøka, sum lítið innihald er í, og sum kanska minnir mest um skemt (Furuseth, 2016b, s. 551). Ummælið hevur so mangan verið sagt at vera í kreppu fyrr, og hóast nekrologar verða skrivaðir um ummælini í hesum døgum, so vísir norski granskarin í bókmentakritikki Sissel Furuseth á, at hetta kjakið kann tykjast absurd eitt nú fyri Norsk kritikerlag, sum als ongar trupulleikar hevur hvørt einasta ár at finna ein virðiligan kandidat til heiðurslønina "Årets Litteraturkritiker" (Furuseth, 2016b, s. 551).

Í oktober 2017 var temaviðgerð í dagblaðnum *Information* um hetta evnið í sambandi við kanning, sum vísti, at ummælini í teimum donsku dagbløðunum vóru fallin 34 prosent frá 2007 til 2017. Greinarnar í temaviðgerðini, sum hevði yvirskriftina "Et Danmark uden anmeldere", høvdu ymisk boð uppá, hvørji ráð eru til at taka, tá kritikkurin verður sagdur at vera í kreppu.

Í kjalarvørrinum av hesum, sum í svenskari grein verður lýst sum ein mentanarbumba, ið brast í Danmark tann 6. oktober (Edenborg, 2018), eru somu kanningar gjørdar í Noregi og Svøríki. Norska kanningin vísir, at ummælini í norskum dagbløðum eru fallin yvir 50 prosent hetta sama tíðarskeiðið frá 2007 til 2017 (Larsen, 2017), meðan svensku ummælini eru fallin 21 prosent hetta tíggjuáraskeiðið; ein ábending um sama rák, hóast støðan er eitt sindur minni apokalyptisk, sum greinskrivarin málber seg (Edenborg, 2018).

Ummælini hava ymisk kor í skiftandi tíðum, tí tey verða ávirkað av samfelagsligum og politiskum rákum og ikki minst av miðlastøðuni, sum ávirkar tey, bæði tá tað kemur til nøgd, longd og innihald, men beint nú er tað kortini týðiligt, at tað ekkóar í londunum rundan um okkum av ávaringum um hetta sama, sum Tóroddur Poulsen er inni á, at ummælið sum tekstslag er í kreppu ella í øllum førum á einum vegamóti, sum krevur, at nýggj ella onnur krøv verða sett til ummælararnar. Svenski ummælarin og yrkjarin Magnus William-Olsson vísir tó á, at hugtøkini "kritikkur" og "kreppa" eru nær skyld. Tey eru bæði skyld etymologiskt, tí tey hava somu málsligu rót, nevniliga grikska sagnorðið "krínein", ið merkir "at kritisera", og innihaldsliga við tað, at tað júst er gjøgnum kreppu, ið leiðir til eina vend og harvið menning, at kritikkurin virkar (William-Olsson, 2018, s. 227). Sæð í hesum ljósinum er kreppa í kritikkinum júst tað, sum skal til, fyri at yrkið mennist og verður styrkt.

Í einari av greinunum frá temaviðgerðini í *Information* í oktober 2017 skrivar danski bókmentagranskarin og ummælarin Erik Skyum-Nielsen, at hann við út við fjøruti ára royndum sum ummælari hóast svartskygdu metingina kann staðfesta, at tað altíð fer at vera ein teigur tøkur í bløðunum til ein lesara (ummælara), sum er opin og áhugaður, sum er væl lisin og sum elskar góðar bókmentir, væl at merkja, um viðkomandi hevur eina sermerkta og mynduga ummælararødd (Skyum-Nielsen, 2017).

Tað, sum krevst fyri at verða hoyrdur í dagsins samfelagi, er við øðrum orðum dugnaskapur – her lýstur út frá eginleikunum at vera opin, áhugaður og væl lisin – og ein sermerkt og myndug rødd.

## Bókmentaligur kritikkur er samskifti millum menniskju

Í nevndu greinini, “Litterær kritik er omgang med mennesker, trods alt”, vísir Erik Skyum-Nielsen á, at tað at ummæla, tá alt kemur til alt, er samskifti við menniskju, og eitt ummæli er eitt møti millum menniskju á trimum stigum.

Fyri tað fyrsta er tað eitt møti millum tekstin og ummælaran sum lesara. Fyri tað annað er tað eitt møti millum ummælaran og rithøvundin. Fyri tað triðja er tað eitt møti millum ummælaran og lesararnar og harvið eitt ískoyti til ta almennu samrøðuna um bøkur í einum samfelagi, lutvíst fyri at seta eina fagurfrøðiliga og mentanarpolitiska dagsskrá, ella – við orðunum hjá Bourdieu – fyri at ogna sær og staðfesta valdið at skilmarka á tí bókmentaliga økinum í samfelagnum (Skyum-Nielsen, 2017).

Eisini danski bókmentagranskarin Morten Nøjgaard setir orð á fortreytirnar fyri tí, sum Erik Skyum-Nielsen er inni á, nevniliga at kritikkur grundleggjandi er møti við onnur menniskju.

Fortreytirnar fyri at úttala ein virðisdóm um eitt verk eru, at eitt bókmentaligt verk er tøkt, sum hevur virði og dygdir, ið gerast viðkomandi og verða mett í menniskjans tilviti í møtinum við verkið, og at semja er um, at útsøgnin hevur eitt ávíst alment gildi (Nøjgaard, 2003, s. 296-297, 301).

Hetta er ein tvístøða í bókmentakritikkinum: øðrumegin tann subjektiva upplivingin av verkinum, sum ummælið krevur, og hinumegin kravið um eitt alment objektivt gildi í útsøgnini av einum virðisdómi. Sambært Nøjgaard kanst tú hava eina persónliga meining um eitt verk, so leingi tú ikki sigur hana hart. Men í tí tú sigur tína meining, er tað ikki bara tín persónliga meining longur, men ein meining, sum vil einum øðrum menniskja okkurt, antin tað er at ávirka tess hugburð ella okkurt annað. Tað er ein samskiftislig gerð(Nøjgaard, 2003, s. 301), byrjan til eina samrøðu.

Tað er hesari samrøðuni, eg hyggi at við Tóroddi Poulsen sum snúningsdepli. Tí hóast vit hoyra nógv um vánalig kor hjá ummælum og ummælarum í Føroyum og um verk, sum eingi ummæli fáa, tá tey koma út – og hetta er eisini rætt – so ber til at siga, at ritverkið hjá Tóroddi Poulsen er dømi um nakað annað. Alt tað, sum sagt verður um ummælarar í og rundan um ritverkið hjá Tóroddi Poulsen, er ein sprelllivandi samrøða, sum í veruleikanum byrjar, tá Tóroddur Poulsen í *Varðanum* í 1979 ummælir fyrsta yrkingasavnið hjá Jóanesi Nielsen, *Trettandi mánaðin*. Hann byrjar hetta ummælið við inngangi, har hann setir teir lesarar ella ummælarar upp á pláss, sum ikki kenna bókmentasøguna og tí halda, at Jóanes er fyrstur at skriva um samfelagstrupulleikar og arbeiðarastættina (Poulsen, 1979, s. 125). Tann 21-22 ára gamli yrkjarin, sum tó ikki læt sítt fyrsta savn úr hondum fyrr enn 5 ár seinni, nýtir ummælið til at harta ummælarar, og hann vísir longu her vitan um skaldskap og tilvit um leiklutin hjá ummælaranum, sum hann setir nøkur krøv til - ein tráður, sum síðan tað hevur verið gjøgnumgangandi í hansara ritverki.

Hetta er helst einastu ferð, at Tóroddur Poulsen hevur skrivað eitt siðbundið ummæli. Tó skrivaði hann í *Oyggjaskeggja* í 1996 eitt sermerkt ummæli av skaldsøguni *Rúm* eftir Carl Jóhan Jensen, sum kann lesast sum ein viðmerking til ummælið sum tekstslag

(Poulsen, 1996), og á sínum bloggi hevur hann tvær ferðir gjørt viðmerkingar til útgávur av *Varðanum*, har hann leggur dent á ummælini ella tað, sum vantar av ummælum í tíðarritinum (bloggoddur, 2016a, bloggoddur, 2016b). Aðrar beinleiðis útsagnir frá Tóroddi Poulsen viðvíkjandi ummælum eru at finna í einum viðtali (Hansen, 2017), men í høvuðsheitum hevur hann gjøgnum árini áhaldandi flættað metaviðmerkingar inn í skaldsligu skriving sína, sínar reaktiónir upp á ummæli um tekstir sínar, viðmerkingar til ummæli sum tekstslag o.s.fr. Ummæli og onnur sløg av metatekstum verða vend upp og niður, umdoypt og avskeplað í skaldsligu tekstum hansara.

Síðani fyrsta yrkingasavn hansara *Botnfall* kom út í 1984, hevur Tóroddur Poulsen sum einstaklingur við sínum mongu útgávum veitt fortreytina fyri einari samrøðu um bókmentir, sum hevur vart øll hesi árini, tvørtur um vanlig staðar- og tíðarmørk. Einari samrøðu, sum tó ikki er ein faktiskur ella relationellur felagsskapur, men ein ímyndaður felagsskapur, har tey, sum taka lut í samrøðuni hava leiklutir og kunnu samskifta tvørtur um mørk í tíð og rúmi; ein felagsskapur, sum Sissel Furuseth við støði í Carolyn Miller kallar virtuellan ella ímyndaðan felagsskap, sum líkist, men eisini kann fría seg frá ítøkiligum samfelagsligum relatiónum (Furuseth, 2016a, s. 463). Hetta at taka á seg leiklutir í einum ímyndaðum felagsskapi gevur meining, tá vit tosa um Tórodd Poulsen, tí hann ger at kalla allar sínar viðmerkingar um ummælarar, øll síni mótummæli, til ein part av sínum skaldskapi, og hansara atfinningar eru partur av fiktiónini. Men eisini ummælararnir hava sínar leiklutir í ímyndaða kritiska felagsskapinum, meira og minni tilvitað.

## Tekstslag í broyting

Við áhaldandi at mótummæla, seta ummælaran upp á pláss og noyða hann at vera tilvitaðan um sín leiklut hevur Tóroddur Poulsen verið við til at ávirka samrøðuna um ummæli í tí ímyndaða kritiska felagsskapinum, hóast hann hevur skrivað fá ummæli sjálvur. Hetta ger hann í trimum løgum: í vavi, innihaldi og formi.

Hann hevur fyri tað fyrsta ávirkað samrøðuna um ummæli í vavi, tí hann hevur framleitt so nógv tilfar, og tey flestu av hansara verkum hava fingið fleiri ummæli í part.

Í øðrum lagi hevur hann ávirkað samrøðuna í innihaldi, júst tí hann noyðir ummælaran at vera tilvitaðan um sín leiklut. Dømi er um, at hann í paratekstinum til *Reglur* fær ummælaran at brúka eina heila síðu upp á at svara aftur og bera í bøtuflaka fyri, at hann upplýsti skeivt føðidato hjá høvundinum í einari viðgerð av hansara skaldskapi (Isaksen, 1995).

Í triðja lagi ávirkar hann samrøðuna í formi, tí at hann fær ummælaran at vera tilvitaðan um tekstslagið. Besta dømið um hetta er kanska ummælið, ella "sussmælið", sum Tóroddur Poulsen plagar at kalla útvarpsummæli ("bloggoddur", 2016a), hjá Trygva Danielsen í samrøðu við Sissal Kampmann av *Skriftstøðum* í Mentanarkaféini hjá Kringvarpinum ("Tóroddur á vektini", 2016). Her verður tilvitið, sum Tóroddur Poulsen noyðir ummælaran at hava um sín leiklut, úttalað beinleiðis, tá Sissal Kampmann steðgar Trygva Danielsen mitt í ummælinum og minnir hann á, at hann má hugsa seg um, hvussu hann

ummælir, tí at tað er Tórodd, hann ummælir. Hetta er avtalað spæl, ein sjónleikur ella eitt metaummæli, sum verður ført fram í trimum ymiskum útgávum, sum vísa, hvussu ymiskt tú kanst fáa burturúr, og hvørjar niðurstøður tú kemur til, alt eftir hvussu tú fert til verka sum ummælari, hvønn leiklut tú tekur á teg, hvørjum brillum tú lesur tekstin við.

Eitt annað dømi, um at Tóroddur Poulsen óbeinleiðis toyggir tekstslagið, er "eftirgangurin" hjá Jóanesi Nielsen í *Sót og søgn*. Tað framgongur í tekstinum hjá Jóanesi Nielsen, at hann er biðin um at skriva eftirorð til *Sót og søgn*, áðrenn hann yvirhøvur hevur sæð verkið. Hann hugleiðir eitt sindur um hetta tekstslagið, ið hann sigur seg ikki hava hugsað um sum eitt serligt bókmentaligt tekstslag, men meira sum eina brodering. Øðrvísi er við fororðunum, ið eru sum eitt slag av portri inn í søguverk og skaldsøgur, og sum mangan eru eitt tað besta við bókunum. Tá Jóanes greiðir frá uppgávuni, hann hevur fingið frá Tóroddi at skriva eftirorð, hómast ein speiskur tóni, tá Tóroddur ikki vil lata Jóanes síggja handritið frammanundan og letur tað vera "hansara problem" at finna útav, hvat skal standa í hesum eftirorðum (Nielsen, 1997). Tá bókin kemur út, hava eftirorðini fingið heitið "eftirgangur", eitt orð, sum kann samanberast við"sussmæli": eitt nýgjørt orð, sum er í ætt við eftirorð ella eftirmæli, men sum ikki er til frammanundan. Soleiðis verður teksturin hjá Jóanesi Nielsen avskeplaður, tí hann fær ókent heiti, sum broytir hansara fyritreytir sum tekst, og gerst liður í spælinum hjá Tóroddi Poulsen við tekstsløgunum. Soleiðis toyggir Tóroddur Poulsen tekstsløgini og brýtur niður tey yrkisligu mørkini við at hoyggja við teimum yrkisligu hugtøkunum, sum eru amboðini hjá høvundum og ummælarum við orðum sum "eftirgangur" og "sussmæli". Onkur ummælari undrast á eftirgangin og setir spurning við, um tað er trýstið á høvundinum at vera nýskapandi, sum er orsøk til, at eftirgangurin er við, tí bókin hevði verið fult so góð uttan (Reinert, 1997). Men í hesum sermerkta teksti hjá Jóanesi Nielsen, sum fær eina lítla speiska vend við heitinum, sum Tóroddur Poulsen gevur honum, skrivar Jóanes Nielsen í veruleikanum okkurt, sum líkist einum ummæli av *Reglum*, har hann lýsir hana sum eina av teimum bókunum, ið seta mark. Hann lýsir hana sum "avantgardlitteratur við stóra A", sum eitt slag av syntesu yvir túsund aðrar bøkur. Umframt at vera ein endurspegling av modernismuni metir Jóanes Nielsen bókina at vera eina av "balkongunum" hjá somu modernismu, v.ø.o. veitir hon útsýni yvir modernismuna. *Reglur*, sigur hann, er ein bók, ið spekir gløggar kritikarar (Nielsen, 1997).

Sum nevnt skrivaði Tóroddur Poulsen eitt sermerkt ummæli í *Oyggjaskeggja* í 1996 um *Rúm* eftir Carl Jóhan Jensen. Ummælið hevur undirheitið "Bókaummæli", og tað er sett upp sum eitt vanligt ummæli við yvirskrift, undiryvirskriftum og orðingum, hóast sermerktum, sum vit kenna aftur frá ummælinum sum tekstslagi: "Fyri sløkum átjan árum síðani...", "Áfyriaftanpermuni...", "Vær endurgevum á blaðsíðu 229..." og "Tó gevur rúmið eitthvørt til umhugsunar", orðingar, sum bera boð um, at eitt verk verður viðgjørt. Út frá paratekstinum verður lesarin soleiðis leiddur til at lesa tekstin sum eitt vanligt ummæli, men hann verður ørkymlaður, tí teksturin er ólesiligur, á tremur við innihaldsliga tómum orðum. Teksturin kann tí ikki lesast ítøkiliga sum ummæli av bókini *Rúm*, men má

skiljast sum ein long og speisk viðmerking til málsliga stílin hjá Carl Jóhan Jensen (Poulsen, 1996).

Hesin tekstur er í tráð við parodisku yrkingina “Úr innasta loynikamari uttangarðs-kalla” við undirheitinum “Eg dugi latín!”, sum varð prentað í yrkingasavnium *Villur* (Poulsen, 1992b). Yrkingin ger málsliga stílin hjá Carl Jóhan Jensen til láturs og sipar til ummælið hjá honum í *Brá* av yrkingasavnium *Framtíðin kemur ikki av sær sjálvari* eftir Jóannes Dalsgaard. Carl Jóhan Jensen heldur lítið um savnið hjá Jóannesi Dalsgaard, sum hann sigur umboðar eitt skaldskaparslag, sum hann nevnir máliskuskaldskap. Carl Jóhan Jensen talar hinvegin fyri einum skaldskapi, sum hann nevnir uttangarðsskaldskap, og sum hann lýsir sum skaldskap, sum yrkir seg undan tí hevdbundna, tømir málið fyri at løða tað av nýggjum og soleiðis leggur afturat og víðkar lívstilvitið hjá sær sjálvum (Jensen, 1989). Hetta ummælið vakti ans, og Hanus Kamban (tá Andreassen) skrivaði eitt mótummæli í *Sosialinum*. Hann sigur tað umboða eina skaldskaparsjón, har allur menniskjaligur samhugi og samfelagsligur áhugi er útkólnaður, og tað ger ein ummælara blindan. Mótummælið hevur yvirskriftina “Tá hugmóð verður haft” (Andreassen, 1989) og er kritikkur av Carl Jóhan Jensen sum ummælara. Hetta hugmóð lýsir Tóroddur Poulsen í yrkingini við keipumynd (Poulsen, 1992b) í líknandi málsligum stíli sum ummælið um *Rúm* og einum møguligum boðskapi um, at tað eisini kann vera ein vandi í at fara so langt uttangarðs, at teksturin ikki er skaldskapur longur, men bert orðaskvaldur. Júst hetta er eitt gott dømi um, hvussu Tóroddur Poulsen kemur inn í samrøðuna um ummæli við speiskum viðmerkingum, sum hann ger til ein part av sínum skaldskapi, í hesum føri í einum avskeplaðum mótummæli í yrkingalíki.

Ummælið um *Rúm* kann lesast sum ein slík speisk viðmerking til bókina og stílin hjá Carl Jóhan Jensen, men eisini sum eitt metaummæli; sum ein viðmerking til ummælið sum tekstslag, har høvundurin tømir tekstslagið innihaldsliga, so tað kann verða fylt av nýggjum (Poulsen, 1996). Samstundis er júst hetta “ummælið” eitt lýsandi dømi um, hvussu ummælið sum tekstslag tekur útgangsstøði í skaldverkinum og hermir eftir tí, í hesum føri tilvitað við tí endamáli at speireka verkið. Tað verður gjørt í skaldskaparlíki og er við til at avlaga tekstsløgini við tí úrsliti, at skaldskapur Tórods verður settur inn í eitt høpi, sum lesarin setir í samband við ummælið, samstundis sum ummæli hansara verða flættað inn í yrkingasøvnini. Soleiðis ørkymlar rithøvundurin tær væntanir, lesarin hevur til tekstin frammanundan, og tann speiska frástøðan er við til at birta upp undir ta valdmiklu støðu, sum Furuseth sigur eyðkenna tað fiktionaliseraða ummælaravirksemið (Furuseth, 2015, s. 49).

## Eitt avleitt tekstslag

Tað er ikki ókent fyribrigdi, at skaldverkið setir spor í ummælið innihaldsliga, tí ummælið snýr seg um skaldverkið, og í formi og í stíli, tí ummælið hevur lyndi til at leggja seg upp at tí verkinum, sum tað lýsir. Í skaldskapinum hjá Tóroddi Poulsen sæst hetta sera væl, tí hann konfronterar ummælaran og kemur við beinleiðis viðmerkingum júst um

tekstslagið og ummælaran. Tekstslagið er jú í sínari grund eitt avleitt tekstslag, eitt mimetiskt tekstslag, skilt á tann hátt at ummælini fyrst og fremst spretta úr skaldverkinum, men eisini so ella so leggja seg upp at tí verkinum, sum tey umrøða og herma eftir teimum. Hetta sæst ofta endurspeglað í heitunum á ummælum, tí tey læna sær heiti frá verkinum, sum tey umrøða.

Í ummælum av skaldskapinum hjá Tóroddi Poulsen sæst hetta t.d. aftur í tí, sum Rói Patursson skrivaði í *Brá* í 1985 um *Botnfall*, sum hevur heiti eftir einari reglu úr savninum: "Tað er altíð onkur, sum smílist í náttini" (Patursson, 1985) – eitt heiti, sum endurspeglar blíðu vælkomuna, Tóroddur Poulsen fekk við sínum fyrsta yrkingasavni. Seinni sæst tað mimetiska tekstslagið í umskrivingum av heitinum í yvirskriftini á ummælinum hjá Kim Simonsen av *Eygnamørkum*, sum hann kallar "Lágmark ella eygnamark" (Simonsen, 2005). Her er talan um eina útbygging av heitinum á savninum, sum eisini lýsir væl innihaldið í ummælinum við sínum avgjørda virðisdómi. Kinna Poulsen tekur í einum av sínum ummælum orð úr paratekstinum til savnið *Skriftstøð*, men umorðar og kallar ummælið "Soleiðis elskar hann orðini" (Poulsen, 2016) eftir orðingini á baksíðuni "Soleiðis elski eg orðini" (Poulsen, 2016c). Alt hetta eru dømi um, hvussu tað endurspeglast í tekstinum, at ummæli eru avleitt tekstslag, sum tekur útgangsstøði í tí skaldsliga tekstinum.

Turið Sigurðardóttir skrivar, at tá yrkingasavnið hjá Janusi Djurhuus kom út í 1914 kallar fyrsta einmansyrkingasavnið fram nýggja ritgenru, t.e. fyrsta veruliga bókarummælið, nevniliga í *Tingakrossi* hjá Kristini í Geil (Sigurðardóttir, 2004, s. 273). Í orðingini: "savnið kallar fram nýggja ritgenru" býr hesin sami tanki um ummæli sum avleitt tekstslag, sum tekstslag, sum er óloysiliga tongt at einum skaldsligum teksti. Men eisini býr í orðingini tankin um hetta, sum eg havi verið eitt sindur inni á út frá Nøjgaard, at eitt ummæli treytar, at eitt bókmentaligt verk er tøkt, sum hevur virði og dygdir, ið gerast viðkomandi í menniskjans tilviti í møtinum við bókina – eitt tilknýti, sum ummælið hevur til tann skaldsliga tekstin. Carl Jóhan Jensen lýsir hetta tilknýtið og hesa framkallan av ummælinum væl í sínum ummæli av *Speispei Spei*. Verkið setir nakað í gongd hjá lesaranum, sum ger, at hann má svara aftur. Og hann sigur: "Nú eg legði yrkingasavnið frá mær á borðið, og tann tómi og blanki telduskíggin ger so forbankað vart við seg" (Jensen, 2000).

## Hvør skal taka lut í samrøðuni?

Tann ímyndaði kritiski felagsskapurin, samrøðan um skaldskapin og um ummælararnar við skaldskapinum hjá Tóroddi Poulsen sum snúningsdepli byrjaði við einum ummæli í 1979 og er enn sprellivandi. Í samrøðu í november 2017 sigur Tóroddur Poulsen sína hugsan um ummælaran og ummælið sum tekstslag, sum hann metir vanda vera fyri, at vit kunnu missa.

Í grannalondum okkara verða nekrologar skrivaðir um ummælini í hesum døgum. Støðan hjá hesum tekstslagi er neyvan betri í Føroyum enn í grannalondunum. Tí er samrøðan millum Tórodd Poulsen og ummælararnar, har krøv verða sett til tekstslagið,

kærkomin og kann vera við til at skapa tilvit og virðing rundan um ummælið sum tekstslag. Hetta skapar harvið eisini eitt tilverugrundarlag fyri ummælið sum tekstslag, sum eigur sítt pláss og hevur krøv at liva upp til; nakað, sum eisini kann vera við til at byrgja fyri, at ummælið sum tekstslag doyr, og hesin valdmikli liður í bókmentaligu ringrásini verður umlopin.

Tóroddur Poulsen lýsir krøvini til ummælaran rámandi við myndburðinum frá slakti og setir eitt minstamark av dugnaskapi, sum skal til fyri at kunna taka lut í tí almennu samrøðuni um bókmentir. Spurningurin er so, hvør sær seg føran fyri hesum; hvør dittar sær at hagreiða skaldskapin hjá øðrum og taka lut í samrøðuni. Í áður nevndu samrøðu í 2017 letur Tóroddur Poulsen sína hugsan um, hvør eigur at taka lut í samrøðuni um bókmentir, skína ígjøgnum, tá hann sigur: "Vit hava upp í nógvar trillibørur av frøðingum, sum hava lisið føroyskt mál og bókmentir, men hvar eru ummælini?" (Poulsen, 2017, s. 56). Hann hartar frøðingarnar fyri at hugsa meira um at skriva slíkt, sum gevur løn og tign á universitetunum, heldur enn at skriva ummæli, ið ikki geva "stig til nakra doktaragrad", sum hann málber seg. Ein av orsøkunum til fátæku ummælaramentanina í Føroyum er sostatt sambært hesum, at útbúnu frøðingarnir svíkja. Áhugaverdur spurningur at seta sum framhald av hesum er, hví ummælaravirksemi ikki gevur somu tign og løn sum annað bókmentaligt virksemi. Hví ummælaravirksemi er so niðurraðfest, hóast tað er so valdmikið og kann hava so breiða ávirkan á bókmentaøkinum – ikki minst, tá hugsað verður um júst tey mongu krøv, ið verða sett til hetta starv.

Tað kann vera trupult at liva upp til krøvini, sum verða sett til ummælarar, og tað er kanska ikki altíð bara stuttligt at sálda gor frá tí, sum er etandi, men tað er ein týdningarmikil uppgáva, og tann, sum er dugnaligur, fær tað at bera til og skapar sær tær umstøður, ið skulu til fyri at verða hoyrdur.

## Bókmentir


Andreassen, H. (1989, 26. august). "Tá hugmóð verður haft". *Sosialurin* nr. 97, s. 10.

Andreassen, H. (1999, 16. desember). "Enn gellir lúður í stavni". *Sosialurin* nr. 240, s. 15.

Andreasen, Uffe og Winge, Mette. 1972. *Kritiske tekster I*. Gyldendal.

bloggoddur. (2016a). Sí Poulsen, Tóroddur. 2016a.

bloggoddur. (2016b). Sí Poulsen, Tóroddur. 2016b.

Bredsdorff, T., Jørgensen, J. C. & Klysner, F. (1983). "Anmeldelsen er en avisartikel. Forhistorie om kritik og anmelderi". *Anmelderi*. T. Bredsdorff, J. C. Jørgensen & F. Klysner (ritstj.). Forfatterne og A/S Fremad af 1979, s. 7-13.

Christiansen, A. (2010). *Kritikarboka*. Fakbokforlaget.

Dylan, B. (2014). "Ballad of a Thin Man" (1965). *The Lyrics*. (Christopher Ricks, Lisa Nemrow, and Julie Nemrow (ritstj.). A CBS COMPANY, s. 212-213.

Eagleton, T. (2005). *The Function of Criticism*. Upprunaliga útgivin í 1984. Verso.

Edenborg, C. (2018, 13. februar). "Den vikande kritiken" *Aftonbladet*. https://www.aftonbladet.se/a/8wO1a2 (02.03.2018).

Escarpit, R. (1968/uppr. 1958). *Litteratursociologi*. W&Wserien 255.

"Et Danmark uden anmeldere". *Information*. https://www.information.dk/serie/danmark-uden-anmeldere-0 (18.01.2018).

Furuseth, S. (2015). *Forfatteren som kritiker*. Novus Forlag. Oslo.

Furuseth, S. (2016a) “Litteraturkritikkens retorikk”. *Norsk Litteraturkritikks historie 1870-2010*. Furuseth et al. (ritstj.). Universitetsforlaget, Oslo, s. 457-472.
Furuseth, S. (2016b). “En pris for kunsten å vurdere: “Årets litteraturkritiker” (1994-)”. *Norsk Litteraturkritikks historie 1870-2010*. Furuseth et al. (ritstj.). Universitetsforlaget, Oslo, s. 548-555.
Hagen, E. B. (2004). *Litteraturkritikk. En introduksjon*. Oslo, Universitetsforlaget.
Hansen, D. (2017). “So steinorðini rapa”. *Varðin* 84, 2. bd., s. 35-59.
Isaksen, J. (1995, 19. apríl). “Var Kafka klaksvíkingur. Heimurin sæddur úr keikioskini”. *Sosialurin*.
Jacobsen, S. B. (2002). *Karr*. Forlagið Fannir.
Jensen, C. J. (2000, 8. januar). “Millumstøðuspei”. *Dimmalætting*. s. 8.
Jensen, C. J. (1989). “Málið kemur ikki av sær sjálvum”. *Brá* nr. 13/14, s. 120-122
Joensen, P. F. (1988/uppr. 1967). *Ramar risti hann rúnirnar*. Onnur útgáva. Tórshavn, Einars prent og forlag.
Kristiansen, A. (2005). *Báðumegin blátt*. Mentunargrunnur Studentafelagsins.
Kyndrup, M. (2009). “Den nødvendige smagsdom”. *Standart* #2, s. 43-45.
Larsen, D. E. U. (2017, 11. november). “Kutter i kritikken”. *Klassekampen*. http://www.klassekampen.no/article/20171111/ARTICLE/171119990 (18.01.2018).
Marnersdóttir, M. & Sigurðardóttir, T. (2011). *Føroysk bókmentasøga 1*. Nám.
McDonald, R. (2007). *The Death of the Critic*. New York, Continuum.
Nielsen, J. (1997). “Eftirgangur” í Tóroddur Poulsen. *Sót og søgn*. Fannir, s. 138-144.
Nielsen, J. (2016). *Bommhjarta*. Mentunargrunnur Studentafelagsins.
Nøjgaard, M. (2003). ”Litterær vurdering”. *Om litteratur. Metoder og perspektiver*. Systime, Århus, s. 293-315.
Patursson, R. (1985). “Tað er altíð onkur sum smílist í náttini”. *Brá* nr.7, s. 85-86.
Pedersen, F. H. (2019). “Våre vigtigste kritikere”. *BLA Bokvennnen Litterær Avis* 5, http://www.blabla.no/metakritikk/2019/05/vare-viktigste-kritikere (22.05.2019).
Poulsen, K. (2016). “Soleiðis elskar hann orðini”. *Listaportal*. 24. oktober. http://www.listaportal.com/tidindi/2016/11/23/soleiis-elskar-hann-orini (18.01.2018).
Poulsen, T. (1979). “Jóanes Nielsen: Trettandi mánaðin”. *Varðin*.
Poulsen, T. (1992a, 10. apríl). “Eitt mótummæli: Hin blinda á listaframsýning”. *Fríu Føroyar* nr. 7.
Poulsen, T. (1992b). *Villur*. Fannir.
Poulsen, T. (1994). *Reglur*. Fannir.
Poulsen, T. (1996). “Skal skaldið síðismetast við tartalakráku? – Rúmið sum rúmskuskepping –“. *Oyggjaskeggi* nr. 5.
Poulsen, T. (2016a). “Gomul handrit og okkurt annað”. http://bloggoddur.blogspot.com/2016/04/gomul-handrit-og-okkurt-anna.html (31.01.2018).
Poulsen, T. (2016b). “10 % av Varða”. http://bloggoddur.blogspot.com/2016/11/10-av-vara.html (31.01.2018).
Poulsen, T. (2016c). *Skriftstøð*. Mentunargrunnur studentafelagsins.
Reinert, L. (1997, 4. desember). “Framhøld?”. *Føringurin*.
Sámalson, A. (1894, 3. mars). “”Vaagen”.”. *Føringatíðindi*.
Sigurðardóttir, T. (1994). “Kappyrking og mótyrking”. *Sýnisstubbar. Greinasavn*. Forlagið Sprotin.

Sigurðardóttir, T. (2004). “Skaldskapurin – vakurleikin - veruleikin”. *Bókmentasøgur. Greinasavn*. Føroya Fróðskaparfelag, s. 268-293.
Simonsen, K. (2005, 14. januar). ”Lágmark ella eygnamark? Meiri krutl frá Tóroddi”. *Dimmalætting*.
Skyum-Nielsen, E. (2017, 6. oktober). “Litterær kritik er omgang med mennesker, trods alt”. *Information*.
“Tóroddur á vektini”. (2016). *Mentanarkaféin*. Mentanarsending hjá KVF. Trygvi Danielsen ummælir *Skriftstøð* hjá Tóroddi Poulsen í samrøðu við Sissal Kampmann. Sissal Kampmann og Suni Merkistein (ritstj.) 1. desember. http://kvf.fo/mentanarkafein?page=13&sid=62107 (18.01.2018).
William-Olsson, M. (2018). “Postkritik och performativ kritik”. *Kritiken i den nya offentligheten*. Magnus William-Olsson (ritstj.). Ariel Litterär kritik [11], s. 225-241.